# Reint nostalgi nú Eivind Petersen áttati



*Ein bróðursonur Eivind, Helgi, sonur Petur og sum hevur búð niðri alt sítt vaksna lív, tók hesa myndina einaferð fyrst í sjeytiárunum. Hálvmørkshandilin er ein serdeilis hugnaligur handil, sum eigur at varðveitast. Hann hevur serligan týdning fyri Oyndfjarðar søgu nú eldri handilin brendi og hesin er tann einasti sum eftir er óbroyttur innan frá tí hann varð bygdur í sjeytiárunum í 19. øld. Kassaapparatið er komið í handilin. Petur Klein og eisini Eivind roknaðu fyrstu tíðina av gomlum vana saman í høvdinum, áðrenn teir slerdu inn á pengaklaverið, sum Jógvan á Grundlendi beinrakið skírdi.*

Miðskeiðis í januar í ár vóru nógv fólk samankomin í Oyndarfirði at heiðra føðingardagsbarninum, Eivind Petersen, sum fylti áttati. Eivind hevur vígt alt lívið innan Stong og Nestanga, ávikavist tað ytsta av norðara og sunnara armi á Oyndarfirði. Lívið, tætta sambandið eg havi havt við Eivind sum handilsmann í bygdini og okkara vinarlag hevur givið íblásturin til hesar reglur sum eru ein føðingardagsheilsan og hugleiðingar um handilslívið í Oyndarfirði í míni tíð.

Árstíðin, Eivind verður mintur á, at eitt ár er komið aftur at hansara lívsleið, er hugalig á tann hátt, at nú ber móti ljósari tíðum. Sólin liggur og gresjar á Reyðafellstindi omanfyri Selatrað og Skálafjørðin hesa árstíðina. Hon sendir sínar enn veiku strálir norður á Rust á Helvtini, sum er skarðið millum Oyndarfjørð og umheimin. Hagani fara tær sína beinu leið heim gjøgnum Breytahjalla og norður í fjall. Oyndfirðingar síggja sólina sum eitt ljóshav norðuri í fjalli hesa árstíðina.

Eivind hevur fylgt við hesum leiki, so langt aftur hann kann minnast. Alt sítt vaksna lív hevur hann búð í Garðamørk, har hann giftist inn. Og sum smádrongur helt hann til heima í Oyndarfirði, niðri í bygdini, hann var stórur smádrongur, áðrenn tey fluttu í nýggj hús sum í dag eisini verða kallaði á Fløtti, hóast navnið var tengt at teim eldru niðurtiknu húsunum niðri í bygdini omanfyri hjá teimum við Lið og á Dunganum. Gamla Fløtt er heldur ikki nakað fyrndarhús. Abbi Eivind í móððirætt, Jens Pauli Clementsen var av Syðradali. Hann bygdi fyrst inni á Bakka í Oyndarfirði, tað hevur verið fyrst í 1880 ´unum og seldi síðan húsini til Ábraham við Stein. Tá hevði hann bygt nýggj hús uppi á Fløtti og tey eru ikki til longur. Hann giftist við Elsebeth Cathrinu Horn úr Oyndarfirði. Hina helvtina av genunum hjá Eivind hava vit til felags. Pápi mín og Eivind vóru systkinabørn. Abbi Eivind í faðirætt kallaðist Petur. Hann var funningsmaður, pápi hansara Jóhan Petur Poulsen var úr Tarti í Oyndarfirði, og giftist til Funnings við Súsonnu Pedersdatter undar Reyni í Funningi. Abbi Eivind giftist við Onnu Sofíu Dahl av Breyt í Oyndarfirði. Tey bygdu í Hoygarðinum á Breyt í Oyndarfirði. Omman og abbin hjá Eivind eru langomma og langabbi mín og teirra foreldur oldurommur og oldurabbar hjá mær. Eg og Eivind hava felags funningsblóð í æðrum okkara, hvønn týdning tað hevur fyri okkum veit eg ikki. Frammanfyri nevnda omma Eivind, langomma mín Anna Sofía, mundi bara ikki sloppið higani frá. Tá ið hon doyði í 1952 var hon 97 ára gomul. Tað var næstan óhoyrt gamalt tá. Starblind sat hon uppi hjá dóttrini, ommu míni á Marknagili, Magninu, og stýrdi "livets gang" niðri í bygdini.

## Eitt jarðiskt himmiríki

Í mun til hinar menninar í bygdini var Eivind heimamaður, haldilsmaður við einum hópi av álitisstørvum og tí minnist eg hann serliga nógv frá barnaárunum. Og Eivind´sa lív ber til at býta sundur í tvey, sum eg minnist. Fyrst mongu árini í Hálvmørkhandlinum, har hann var einaráðandi og síðan í nýggja handlinum við Tartavegin, har hann hevur hildið til seinastu mongu árini og har hann enn er til arbeiðis hvønn einasta gerandisdag í vikuni.

Vit áttu tveir handlar í Oyndarfirði, tá íð eg var smádrongur og hesir lógu eitt sindur avsíðis, fyrst Hálvmørkshandilin og síðan inni í Víkum. Og tað merkir eisini, at vit áttu tveir handilsmenn, Eivind, sum búði innast í bygdini, átti heimara handilin og Petur Klein, sum búði heimi í bygdini í Haraldsstovu átti innasta handilin.

Hesin handlar fingu eitt serstakt pláss í lívinum hjá okkum børnum. Uttanfyri skivuna í hesum báðum handlum fingu vit eitt tev av himmiríki innan skivuna. Har angaði av søtum vørum uttan úr heimi. Bommeskjurnar úr blikki vóru stórar í okkara barnaeygum og áttu vit eitt oyra, so fekkst upp í eitt kramarhús, sum Eivind, var kvikur at evna til.

Her var himmiríkið sætt við jarðiskum eygum. Her var ongin líðandi Jesus, sum græt yvir okkara syndir og gav okkum ringa samvitsku. Hann hoyrdi til heima í Missiónshúsinum, sum stóð har kalt sum eitt íshús við himmalhválvi upp undir loftinum, og sum abbabeiggi mín Jákup í Skúlanum var upphavið til Her inni í handlinum var reint njótilsi og jarðiskt prát. Her stóðu vørur, sum vit bara smakkaðu onkuntíð og tað reyk ramliga og hugnaligt av petroleum, sum vit plagdu at keypa fyri eldri fólk, fyri eitt smáoyra. Mjølskuffurnar vóru stórar og goymslan fekk ikki annað navn enn Mjølstovan.

Her stóðu menn uttanfyri skivuna og prátaðu og drukku øl. Eivind drakk ikki øl. Hann var álitismaður í halgidóminum, klokkari, í kirkjuráðnum í missiónshúsinum Teir keyptu mest mjøl, te, margarin ger og sukur. Tá ið menn komu av skipi sóust teir eisin í handilinum, kanska eisini eitt sindur meira teir fyrstu